F. L. j. nr. 2204-2-70 F.L. 2204-2040/55. 70.

L. Nr. 325 - 2/5 - 1957.

**F r á s ø g n.**

Hesi jarðføstu fornminni í Húsavík eru samb. løgtingslóg nr. 19, 16. september 1949, um friðan av fornminnum og bygningum friðað:

I. Stórastova og hinar toftirnar hjá Húsfrúnni.

1. "Stórastova". Eigari: Óli Samuelsen í Skumputoft, Húsavík.
2. "Stórustovugarður". Eigari: sami.
3. "Niðara Løða". Eigari: sami.
4. "Ovara Løða". Eigari: Føroya Fornminnissavn.
5. "Sjóartoft" ella "í Lofti". Eigari: Thomas Michael Johannesen, Húsavík.
5. "Steikarhús". Eigari: sami.
7. Ein hoygarður vestan fyri Steikarhús. Eigari: Johannes A. Anthoniussen og Jens Pauli Anthoniussen, Húsavík.
8. "Stórustovutún": Eigari: Bygdin - sóknarstýrið.

Friðað verður eftir hesum beinu linjum:

3 alin eystan fyri Ovara Løðuvegg og oman til og við sunnara Løðuveggi. Linjan hevur sama vísing sum Ovari Løðuveggur.

Frá Ovaru Løðu og 3 alin vestur um hoygarðin hjá Johannes A. og Jens Paulá Anthoniussen. Linjan verður 3 alin frá Løðuni og hoygarðinum, og síðan um stórustovugarð og 3 alin frá, í hoyggjhúsið hjá Óla Samuelsen og fram við norðaru síðu á húsunum í Skumputoft og til Niðaru Løðu.

II. Kvíggjargil "Uppi í Toftum".

Eigari: Thomas Michael Johannesen, Húsavík.

Friðað verður samsvarandi tekning, har tann puntaða linjan vísir tað friðaða økið. /.

III. Kirkjugarðurin uppi í Kvíggjargili.

Eigari: Frú Simona Niclasen, København. Í hondum hevur Janus Sørensen, Húsavík.

IV. Brynhildarheygur.

Festi. Bóndi: Thomas Jacob Dam, Húsavík. ( [illegible] )

V. Skeiðistoft, niðri á Sondunum. Almenningur.

Eigari: Bygdin.

Hesa frásøgnina verður sorinskrivarin biðin tinglesa á ognirnar samsvarandi omanfyri nevndu løgtingslóg.

FØROYA LANDSSTÝRI, Tórshavn, 16 mai 1957.

Landsstýrismaður.

Læst i Færøernes Ret d. 21 MAJ 1957

Genpart indføjet i Genparts-Skøde- og Pantebogen.

Over ejendomme som omhandlede i Húsavík fuldstændig findes ingen/ Fortegnelse ved Færøernes Retskreds, hvorfor intet kan attesteres om Adkomst til eller Behæftelser paa samme.

| | |
|---|---|
| Gebyr | 2 Kr. 12 Øre |
| Bekræfteises-vederlag | 1 Kr. 00 Øre |
| | 3 Kr. 12 Øre |
| tre Kroner | tolv Øre |